












# Góð sethús á Argjum

Húsini standa í Reynstún á Argjum. Her er barnavinarligt og fleiri vøggustovur - og barnagarðar eru beint við. Eisini liggur fótbóltsvøllurin stutt frá.

Útsýnið er einastandandi yvir alla Havnina.

Húsini eru vælhildin og í trimum hæddum. Tey eru stoypt upp allan vegin upp, so her hoyrist einki til veður og vind. Í miðhæddini er durur, gongd, baðirúm, køkur, tvey kømur, fýrrúm/vaskirúm/grovkøkur og ein sera góður hjallur. Frá køkinum er atgongd til grovkøkin og víðari út í hjallin. Á loftinum er stova, kamar og baðirúm. Kjallarin er óinnrættaður - ovari parturin er krúpikjallari.

Í durinum og grovkøkinum eru flisar á gólvinum. Øll hini gólvini eru furugólv. Innhurðarnar eru furu fyllingshurðar og loftini eru træloft. Køkurin er stórur og sera rúmligur – her er eisini ein brenniovnur.

Húsini eru stoypt upp og klødd við timbri. Omanfyri húsini er ein góður sólkrókur. Húsini standa í barnavinarligum og friðarligum umhvørvi, stutt er til dagstovnar og ítróttarøki. Húsini hava einastandandi gott útsýni.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 357400.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adr.: | Reynstún 11, Argir |
| Byggiár: | 1987 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 232 fermetrar |
| Grundøkið: | 546 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.100.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**